# Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark

# Ársfrágreiðing

# 2019

## Stovnsupplýsingar

Ráðgevingin er ein sjálvognarstovnur, hvørs endamál sambært viðtøkurnar er:

- At **veita** føroyingum í Danmark hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum
- at **reka** upplýsandi arbeiði á nevndu økjum mótvegis einstaklingum, myndugleikum og stovnum her og heima
- at **virka** sum millumlið millum føroyingar í Danmark og myndugleikar og stovnar her og heima innan nevndu øki.

Málbólkarnir sum Ráðgevingin vendir sær til er millum annað:

- Føroyingar í útbúgving í Danmark
- Føroyskir sjúklingar í viðgerð í Danmark og teirra avvarðandi
- Føroyingar, ið ætla sær til Danmarkar og sum ætla sær heimaftur.
- Fastbúgvandi føroyingar í Danmark

## Leiðsla

Ovasta leiðsla stovnsins er ein trýmanna nevnd:

Bogi D. Davidsen, dr.med., formaður, umboð fyri Føroya Landsstýri.
Marianna Andreassen, cand.scient.soc., næstforkvinna, umboð fyri brúkarar.
Randi Johannesen, sosialráðgevi, umboð fyri starvsfólkið.

**Grannskoðari:** NUMO Spf. – Símun Absalonsen

## Fíggjarviðurskifti

Virksemi stovnsins verður fíggjað við stuðulsjáttan á Fíggjarløgtingslógini. Stuðulin verður latin sambært treytum, ásettum í reglugerð um stuðulsjáttan til Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark. Játtan fyri 2019: 1.248.000 kr. Størsti posturin er løn v.m. til starvsfólk og síðani rakstur av skrivstovuni.

## Skrivstova

Ráðgevingin hevur skrivstovu á Sendustovu Føroya á Norðuratlantsbryggjuni, Strandgade 91, 4., 1401 København K.

## Starvsfólk

Tveir sosialráðgevar, Bjørg Svartá og Randi Johannesen ávikavíst 30 og 32 tímar.

## Viðtalutíð

Ráðgevingin hevur viðtalutíð 4 dagar um vikuna, 16 tímar tilsamans. Hvønn týsdag arbeiðir ein av ráðgevunum á Sjúklingahotellinum Tórshavn.

## Persóndatavernd

Ráðgevingin fylgir ásettu reglunum í 'Persondataforordningen' - GDPR (General Data Protection Regulation) – fyri at verja pesónsupplýsingar hjá viðskiftafólki. Ráðgevingin hevur í hesum sambandinum gjørt ein persóndatapolitik, sí bilag 1.

**Nevndarátekning til**
**Ársfrágreiðing 2019 fyri**
**Ráðgevingina fyri føroyingar í Danmark**

Nevndin fyri Ráðgevingina fyri føroyingar í Danmark hava dags dato góðtikið ársfrágreiðing 2019 fyri Ráðgevingina fyri føroyingar í Danmark.
Ársroknskapur 2019 er kannaður og góðtikin og sendur Føroya Landsstýri svarandi til viðtøkurnar fyri stovnin.
Nevndin góðtekur bæði Ársoknskap og Ársfrágreiðing fyri 2019.
Nevndin metir, at ársfrágreiðing og ársrokskapur fyri 2019 geva eina rættvísandi lýsing og mynd av virksemi stovnins.

Keypmannahavn t. 30. mars 2020

Nevndin:

| Bogi D. Davidsen | Marianna Andreassen | Randi Johannesen |
| --- | --- | --- |
| formaður, umboð Føroya Landsstýri | brúkararaumboð, næstforkvinna | starvsfólkaumboð |

Lýst er niðanfyri skipan og karmar fyri at kunna viðvirka til felags ábyrgd og burðadygga broyting. Vit fata burðardygd sum ein eygleiðingarháttur, sum gevur Ráðgevingini øðrvísi innlit í sosialar støður. Sosial burðardygd er grundarsteinurin í okkara sosiala arbeiði. Vit seta lokal átøk í verk sum undirbyggja nationala strategi.

## Ráðgeving/vegleiðing – Miðlan/Kunning – Samstarv

Ráðgevingin er ein professionel og smidlig føroysk sosialráðgeving, ið strembar eftir at veita sínum viðskiftafólkum best møguligu tænastuna við støði í

- Fyriskipanarligari dygd
- Fakligari og praktiskari dygd innan sosialráðgeving
- Borgaraupplivdari dygd

**Kjarnuvirðini hjá stovninum eru:**
- Álit, virðing, rættvísi og ábyrgd í okkara samstarvi og samskifti við viðskiftafólk, avvarðandi, netverk og aðrar týðandi aktørar.

**Visjón**
At vera ein sjónlig og støðugt mennandi føroysk sosialráðgeving í Danmark
- Ein samtíðar, samskapandi og samskipandi sosialráðgeving

**Misjón**
Okkara misjón er:
- At vera felags um uppgávurnar, arbeiða tvørfakligt og harvið slóða fyri tí góðu gongdini fyri okkara viðskiftafólk, avvarðandi og samfelag.
- At stuðla undir evnum og tilfeingi hjá viðskiftafólkinum at megna egnu støður og ynskir.

**Virkisøki**
Sum ein tvítjóðað ráðgeving millum Danmark og Føroyar, er okkara virkisøki fjøltáttað og umfatandi. Arbeitt verður við tveimum ymiskum lóggávum og reglum á nógvum sosialum økjum, og gjøgnum árini hevur Ráðgevingin ognað sær royndir, vitan og serkunnleika, ið viðskiftafólkini ikki kunnu fáa neyvari aðrastaðni.

Ráðgevingin setir viðskiftafólkini í miðdepilin, og veitir fyrst og fremst ráð og vegleiðing í teimum spurningum/trupulleikum, sum tey hava. Vit leggja okkum eftir, at arbeiðið er tvørfakligt, rehabiliterandi, heilsufremjandi og fyribyrgjandi.

Ráðgevingin fremur upplýsandi arbeiði innan fyri arbeiðsøkið hjá stovninum. Upplýst verður um lóggávu, rættindi og møguleikar i Danmark og Føroyum.

Vit miðla eisini vitan og atgerðarmøguleikar innan sosialar spurningar og truplar støður. Bæði til tann einstaka, bólkar, í almenna rúminum og á politiskum stigi. Ráðgevingin virkar sum bindilið

millum einstaklingar, stovnar og myndugleikar, har vit gera vart við stirvnar ella manglandi mannagongdir og lóggávur.

Ráðgevingin hevur serkunnleika innan sosiala heildarráðgeving og veitir ráð og vegleiðing í teimum sosialu spurningum/trupulleikum viðskiftafólkini hava. Ráðgevingin hjálpir við upplýsingum um reglur og lóggávu, stuðlar við at raðfesta og samskipar, vísir á møguleikar, stovnar og serfrøðingar. Ráðgevingin veitir eisini hjálp og stuðul til at skriva umsóknir og kæra avgerðir.
Øll kunnu venda sær til Ráðgevingina, ongin skráseting fer fram, og ráðgevarnir hava tagnarskyldu.

**Yvirskipaðar karmar fyri stovnin**
Ráðgevingin ynskir yvirskipað at arbeiða við Heimsmálunum sum strategisk amboð, og hava vit í 2017 ”lagt lunnar” undir arbeiðið. Ì 2018 og 2019 hava vit málrættað okkara sosiala virki og arbeiði innan seks Heimsmál. Og vilja vit geva ítøkilig dømir undir hvørjum av teim seks heimsmálum.

Okkara ráðgeving/vegleiðing, miðlan/kunning, samstarv og innsatsøkir eru strategisk tonkt í mun til tey seks Heimsmálini, har innsatsøkini innan menning – trygd og dygd fyri 2018 og 2019 avmynda tann strategiska hugburðin á stovninum í mun til Heimsmál. Stovnurin arbeiðir víðari við at menna tað praktiska sosiala arbeiði og miðvíst at menna trygd og dygd. Har okkara visjón er leiðstjørnan.




Mál 1. Gera enda á fátækadømi í øllum tess líki allastaðni
Mál 3. Tryggja øllum heilsugott lív og virka fyri trivnaði fyri øll í øllum aldri,
Mál 4. Tryggja øllum inkluderandi og rættvísa dygdargóða útbúgving og virka fyri lívlongum læringarmøguleikum fyri øll
Mál 10. Minka ójavnað í londum og ímillum lond

Mál 16. Virka fyri friðsomum og inkluderandi samfeløgum fyri burðardyggari menning. Útvega øllum atgongd til rættartrygd og byggja munagóðar, ábyrgar og inkluderandi stovnar á øllum stigum og

Mál 17. Styrkja amboðini at verkseta og stimbra *Heimsfevnandi partalagið fyri burðardyggari menning*

Ráðgevingin er ein tvítjóðað ráðgeving millum Danmark og Føroyar, og grundfest lokalt og nationalt innan ríkisfelagskapin. Her ígjøgnum eru vit vitandi um, at vit eisini eru ein partur av tí globala felagskapinum. Og at tað ikki er nokk, at seta síni egnu lokalu og nationalu mál, men skal síggjast í einum størri perspektivi.
Í okkara dagliga arbeiði síggja vit týðiliga, hvussu nógv tað kann broyta, tá menniskju hava sama rætning og mál, og vilja lyfta saman og draga somu línu. Tað er tað vit síggja sum kjarnan við verðinsmálunum, at vit hvør ísær lokalt, nationalt ja, heilt niður í tann einstaka, gera tað, vit kunnu fyri at náa verðinsmálini.

## Stutt um sociala arbeiði innan tey seks Heimsmálini:

Heimsmál 1, 3, 4 og 10 niðanfyri og 16 og 17 undir samstarv.

**Mál 1.** Fátækaradømi síggja vit í einum sosialum perspektivi, har vit arbeiða málrættað við sosialum innsatsum - bæði innan sosiala fyribyrging og heilsufremjan, innan socialar veitingar og tilboð serliga til sárbarar bólkar. At brúkarin kann fáa atgongd til basalt sosialt tilfeingi og tænastuveiting og annan stuðul.

Til dømis hava sjúklingar í viðgerð í Danmark og teirra avvarðandi fíggjarligar avbjóðingar, har tað hevur alstóran týdning at familjurnar fáa kunning um rættindi, møguleikar og hjálp til at søkja um veitingar, so tíðliga sum gjørligt í forløbinum. Tey sum eru langtíðarsjúk missa í nógvum førum teirra inntøkugrundarlag, tá tey ikki longur hava rætt til sjúkradagpening. Ráðgevingin hevur gjørt avvarðandi myndugleikar vart við henda trupulleika.

Yvirskipa arbeiða vit við at gjøgnumføra bæði lokalt og nationalt hóskandi sosial trygdarsystemir og tiltøk fyri allar socialt útsettar bólkar. Og saman við Fólkatingslimun og tí Føroysku sendistovuni arbeiða vit við markaforðinum innan ríkisfelagskapinum

**Mál 3.** Vit arbeiða við sosialari heilsu og trivnaði fyri okkara brúkarar í øllum málbólkum og aldri. Vit eru viðvirkandi til at tryggja okkara brúkarum heilsugott sosialt lív og virka fyri sosialum trivnaði. Vit arbeiða á øllum niveaum bæði individuelt, fyri bólkar, politisk, jura og samfelag, har vit eru partur av felagskapum, sum kunnu lyfta saman innan geirar, stovnar og millum lond her DK/FO. Sosial heilsa og trivnaður ávirkar bæði tað psykiska, fysiska og andaliga sum førir trivna við.

Úrskurður av fyrispurningum innan socialari heilsu og trivna, ið Ráðgevingin fær, eru sera ymiskir. Summir eru einfaldir og skjótir at svara og avgreiða, t.d. fyrispurningar í samband við flyting og NemId. Viðskiftafólkini her eru serliga lesandi, men eisini aðrir føroyingar, ið flyta til Danmarkar. Aðrir spurningar frá hesum bólki av viðskiftafólkum kunnu ofta, at síggja til tykjast einfaldir, men vísa seg at gerast umfatandi og tíðarkrevjandi. Hetta kann t.d. vera skattaspurningar, har

viðskiftafólk fáa lítla-, ógreiða og onkuntíð skeiva vegleiðing frá Skat í samband við t.d. føroyafrádrátt, flyting, fasta ogn í Føroyum, dupultskatting osfr. Ráðgevingin kann tí fevna bæði um føroyskar og danskar reglur.

Ein serligur bólkur av viðskiftafólkum, eru sjúklingar, ið verða sendir til Danmarkar í viðgerð. Fyrispurningar frá sjúklingum og avvarandi kunnu vera einfaldir og skjótir at avgreiða, t.d. hjálpa við at útfylla umsókn um dagpening.

Aðrir fyrispurningar kunnu vera sera kompleksir og harvið tíðarkrevjandi. T.d. tá talan er um sjúklingar, sum verða sendir akutt niður. Bæði sjúklingur og avvarðandi eru tá ófyrireikaði uppá støðuna. Tey skulu bæði fyrihalda seg til sjálva sjúkuna, eina aðra mentan og samstundis tað brátt íkomnu sosialu og økonomisku støðuna, sum bæði kann hava við arbeiðsviðurskifti, barnaansing, persónliga økonomi v.m. at gera. Her er sera umráðandi at teir vera loftaðir og fáa ráð og vegleiðing, soleiðis at neyðug hjálp kann setast í verk. Talan kann vera um uppgávur, sum innvolvera bæði føroyskar og danskar myndugleikar, evt. eisini onnur lond. Sum dømi kunnu nevnast tryggingarútgjald í samband við lívshættisliga sjúku, útgjald í samband við óarbeiðsføri frá NAV í Norra, trygging í samband við arbeiðsskaða o.a.

Er talan um familjur við børnum, kann tað gerast neyðugt við ansing av børnum á stovni ella undirvísing. Tá talan er um sjúk børn, skal evt. søkjast um inntøkumiss frá Almannaverkinum. Í slíkum málum hevur Ráðgevingin ein samskipandi leiklut. Ráðgevingin stuðlar og hjálpir sjúklinginum ella avvarðandi við at útvega røttu skjølini og tryggjar, at skjøl og váttanir verða útfylt rætt og send til røttu mynduleikar. Eisini skrivar Ráðgevingin um neyðugt, vegna sjúklingin og avvarðandi, frágreiðing um støðuna hjá sjúklinginum/familjuni til avvarandi myndugleikar, og fylgir upp, at málið verður avgreitt og familjan fær boð um avgerðina

**Mál 4.** Ráðgevingin arbeiðir við at tryggja øllum okkara málbólkum inkluderandi og rættvísa dygdargóða útbúgving og vit virka fyri lívlongum læringsmøguleikum fyri øll.

Føroysk børn í skúlaaldri, sum uppihalda seg í Danmark í samband við at foreldur elle systkin eru í sjúkraviðgerð í Danmark,  fáa vegleiðing um teirra rættindi í mun til undirvísing og Ráðgeingin hjálpir við at fáa undirvísing sett í verk. Ráðgevingin gevur lesandi upplýsing um teirra møguleikar og rættindi í mun til útbúgving.

**Mál 10.** Dagliga arbeiða vit við at minka sosiala ójavna bæði her í DK og millum FO/DK. Vit arbeiða við bæði á mikro-, meso- og makroplani, at rætta upp á tann ójavna og harvið trupuleikar vit renna okkum í á øllum planum (niveau). Td. innan sosiala heilsu- og sjúku og ójavna í mun til tilboð og veitingar.

Til dømis ójavna innan heilsu og sjúku í mun til tilboð og veitingar, við at vísa á, at føroyingar í viðgerð uttanlanda ikki hava somu rættindi í mun til veitingar frá Heilsutrygd, sum sjúklingar í viðgerð heima í Føroyum. Fíggjarligan ójavna við at vísa á tørv hjá langtíðarsjúkum, sum missa teirra inntøkugrundarlag. Arbeiða fyri at øll skulu fáa upplýsing um teirra rættindi og møguleikar og harvið fáa líka atgond.

## **Menning – trygd og dygd**: **Yvirskipaði innsatsøkir 2018 – 2019**

Tørvur er á lýsingararbeiði í mun til stovnin, ein føroyskur stovnur í einum sosialum perspektivi . Í mai 2019 varð skipað fyri arbeiðsseminari fyri nevnd og starvsfólk, har arbeitt varð við heimsmál og innsatsøkjum fyri 2019 – 2020 við støði í innsatsøkjum frá 2018: har fokus var á samskifti og framtíð innan praksis. Prakis á mikro-, meso- og makroplan – anlit til anlit relatión og digital relatión. Betran og strategi av núverandi praksisøkjum og strategi fyri nýggjum praksisøkjum.

Ráðgevingin nýtir millum annað heimasíðuna hjá stovninum og facebook-síðuna til at sjónligera arbeiðið hjá Ráðgevingini.

Í 2019 hevur Ráðgevingin havt vitjan av løgtingskvinnunum Annitu á Fríriksmørk og Rigmor Dam, sum hevði sæti á fólkatingi fyri Sjúrður Skaale. Báðar komu á vitjan fyri at hoyra nærri um um arbeiðið í Ráðgevingini.
Útyvir tað sum fyrr er lýst í mun til sjónliggeran, hevur Ráðgevingin í 2019 arbeitt viðari við:

**2. Trygd- og dygdarmenning**
Ráðgevingin arbeiðir framhaldandi við trygdar- og dygdarmenning á ymiskum stigum og sjónarhornum. Tað er sett sjónareyga á at menna praksis og samstarv internt og eksternt.

Internt við at halda skipaðar fundir, har samstarv er sett á dagsskrá.

Eksternt við at menna dagliga samstarvið við Sjúklingahotellið Tórshavn við leypandi dialog við starvsfólkið um fokus á sosialu støðuna hjá sjúklingunum. Arbeitt verður við dygdarmenning av visitatiónini til sosialráðgeva á Sjúklingahotellinum Tórshavn, og guidelines við uppmeksemis-punktum í samband við ávisíng til sosialráðgeva.

Leypandi diaglogfundir og ásettar formellar fundir við sjúklingavegleiðaran á Ríkissjúkrahúsinum, har fokus er á sosialu støðuna hjá sjúklinginum, og har aktuel mál og ymisk viðvíkjandi samstarvi okkara millum er á skránni.

Meting bleiv sett á skránna hjá Ráðgevingini í 2019. Á seminari í maj varð avgjørt at inndraga meting  sum amboð í samband við fakliga førleikamenning. Arbeiðshátturin bleiv royndur á seminarinum og hevur verið arbeitt víðari við tí á einum nevndarfundi. Arbeiðshátturin, ið verður nýttur er 'innovativ meting'. Ein metingarháttur, sum hevur fokus á at skapa fakliga menning og betra um praksis. Málið er at gera meting í 4 málum árliga. Eitt av metingar-parametrunum er professións siðfrøði innan virki hjá sosialráðgevaranum. Tað er tørvur á fokusskift frá siðfrøði, sum nakað sum bert er tonkt í mun til "individ" til siðfrøði sum er knýt til sjálva metingina, sum ein serlig praksistilgongd í einum felagsskapi.

**2.1** Markaforðingar innan Ríkisfelagsskapin.
Tað hevur verið ein afturvendandi trupulleiki, at tað í samband við nýggja lóggávu í Danmark og Føroyum ikki hevur verið tikið hædd fyri avleiðingum í mun til Ríkisfelagsskapin. Ráðgevingin ger framhaldandi vart við hesar trupulleikar, og kunnar avvarðandi ráð og føroysku fókatingslimirnar,

tá nýggjar forðingar vísa seg. Ráðgevingin hevur samband við viðskiftafólk, ið flyta ímillum Føroyar og Danmark, og hevur tí vitan um markaforðingar innan Ríkisfelagsskapin.

**2.2** Háttarlag í sociala praksis
Arbeitt hevur verið við at dygdarmenna og lýsa háttarlag, arbeiðsgongdir og mannagongdir innan organisatoriska-, fakliga- og brúkaraupplivdari dygd.

Herundir hava vit arbeitt strategiskt við menning- og implementereing af IPLS - interprofessionel læring og samstarv. Í samband við menning av tvørfakligum samstarvi hevur starvsfólkið verið á IPLS-skeið.

## 3. Verkætlanir
Verkætlan er her skilmarkað sum tiltøk ið eru málrættað stovn ella málbólkar.

**3.1** Menning og endurmenning
Ráðgevingin arbeiðir áhaldandi við rehabiliterandi tilgongd og arbeiðshátti, ið hevur til endamáls at stuðla og birta undir menning og endurmenning hjá sjúklingum. Tvørfakligt samstarv við og um sjúklingin er ein týdningarmikil liður. Samstarv millum sjúkling, avvarðandi og yrkislærd setir tískil krøv til, at fyriskipanin er smidlig og fokus er á styrkir og møguleikar. Tað er umráðandi, at rehabiliteringsátakið byrjar beinanvegin og krevur, at viðgerðar- og røktartilgongdin stuðlar sjúklinginum í virkismøguleikum, so sjúklingurin tekur lut í teimum avgerðum, ið verða tiknar í menningar- og endurmenningartilgondini. Tað er umráðandi at vit síggja prosessina sum eina samskipaða heildarprosess, og í samskapan við tí fyriskipaðu sjúklingagongdini, har øll lívisins viðurskifti hjá sjúklinginum skulu havast í huga. Her hevur Ráðgevingin ein samskipandi leiklut.

**3.2** Verkætlan: rehabilitering og felagssamrøður
Rehabiliteringssamrøður millum sjúklingar við munn- og hálskrabba, avvarðandi, sjúkrarøktarfrøðing á Sjúklingahotellingum Tórhavn og sosialráðgeva frá Ráðgevingini, ið var sett í verk sum roynd í 2016/2017 er nú eitt fast tilboð til sjúklingar við munn- og hálskrabba. Eftirmetingin var, at við at bjóða sjúklingi og avvarðandi til eina skipaða samrøðu verður givið høvi til at tosa um sjúkuna og seta spurningar og tað ger ein mun fyri sjúklingar og avvarðandi. Tað er eitt gott høvi at koma rundanum sjúkraforløbið og sosialu støðuna her og nú, men eisini í mun til evt. skjerdar arbeiðsførlekar og hvørjir møguleikar eru fyri stuðli. Í 2019 hevur ein bólkur við einum sjúkrrøktarfrøðingi á Sjúklingahotellinum, sjúklingavegleiðaranum og einum sosialráðgeva í samband við IPLS-skeið (Facilitator i interprofessionel læring og samarbejde) arbeitt við at gera ein leist fyri felagssamrøður í mun til sjúklingar í longri ella kompliseraðum forløbum. Hesin leistur verður nú nýttur í tvørfakliga samstarvinum.

**3.3** Børn sum avvarandi
Ráðgevingin hevur framhaldandi roynt at seta fokus á børn sum avvarðandi til álvarsliga sjúk foreldur ella systkin. Børnini eru ofta stødd í Føroyum, og tí ikki sjónlig her, men tað er alneyðugt at tað verður tosað við foreldrini um, hvussu børnini hava tað og kunna um hjálparmøguleika. Stuðla familjunum og hjálpa foreldrum at hjálpa teirra børnum best møguligt.

Sosialráðgevarnir hava verið á Sorgkonference, sum Børn, unge og sorg (Det nationale sorgcenter) skipaðu fyri. 'Livsfortællinger og meningsfulde narrativer i sorgen', har millum annað seinastu granskingarúrslitini á økinum vóru løgd fram.

**3.4** Temadag
Í 2018 varð arbeitt við fyrireiking av felags temadegi fyri sjúkrarøktarfrøðingunum á Sjúklingahotellinum Tórshavn, sjúklingvegleiðaranum og sosialráðgevunum í Ráðgevingini, har endamálið er at stimbra tað tvørfakliga samstarvi og felags innsatsøkir til gagn fyri sjúklingar og avvarðandi. Temadagurin bleiv hildin á Norðuratlantsbryggjuni í januar 2019. Dagurin var samansettur av styttri framløgum, workhops og felags orðaskifti. Felags innsatsøkir: Felagssamrøður í kompliseraðum ella longrivarandi forløbum og felags stuttan dialogfund hvønn týsdag á sjúklingahotellinum.

**3.5** Sjálvbodna fylgjaratænastu
Ráðgevingin hevur luttikið í fyrireikandi arbeiðnum í samband við at seta á stovn eina sjálvbodna fylgjaratænastu knýtt at Sjúklingahotellinum Tórshavn. Sjúklingahotellið tekur ímóti sjúklingum, sum av ymsum ávum ikki hava møguleika fyri at hava fylgjara við úr Føroyum, og sum hava tørv á at verða fylgd til og frá sjúkrahúsi. Uppgávan hjá teimum sjálvbodnu er at skapa tryggleika í sambandi við flutning.

## Samstarv
Ráðgevingin fremur tvørfakligt samstarv og er bindilið millum einstaklingar, stovnar og myndugleikar. Vit vísa á møguligar loysnir uppá trupuleikar. Vísa eisini á ítøkiligar mannagongdir og lóggávu, sum kunnu geva trupuleikar í praksis.

**Mál 16.** Ráðgevingin hevur átøk sum virka fyri friðsomum og inkluderandi samfelag fyri burðardyggari menning td. Innan heilsuverkið. Vit stremba ímóti at útvega øllum atgongd til rættartrygd og viðvirka til at byggja munagóðar, ábyrgar og inkluderandi stovnar á øllum stigum. Fundir í FO og DK við okkara samstarvsstovnar.

Í samband við ráðgeving og vegleiðing av sjúklingum og avvarðandi, hevur Ráðgevingin eitt tætt samstarv við Sjúklingahotellið Tórshavn, føroyska sjúklingavegleiðaran á Ríkissjúkrahúsinum og Uttanlandstænastuna á Landssjúkrahúsinum. Harumframt kunnu nevnast Heilsumálaráðið, Almannaverkið, Heilsutrygd, Apoteksverkið, Barsilsskipanina, ALS og Gigni.

Í samband við ráðgeving og vegleiðing av lesandi, samstarvar Ráðgevingin við Altjóða Skrivstovuna, Meginfelag føroyska studenta, Statens Uddannelsesstøtte, útbúgvingarstovnar, TAKS og SKAT v.m.

Sosialráðgevarnir í Ráðgevingini vóru í Føroyum í februar 2019. Endamálið við ferðini var at styrkja samstarvið við føroyskar myndugleikar og stovnar, sum Ráðgevingin samstarvar við. Fundir vóru við Almannamálaráðið, Eyðgunn Samuelsen; Heilsu- og innlendismálaráðið, Sirið Steenberg; Almannaverkið deildirnar Børn og ung og Menning; útbúgvingarvegleiðaran á Studna; Uttanlandstænastuna á Landssjúkrahúsinum; Taks og Beran.

Sosialráðgevarnir hava gjøgnum árið havt samband við føroyskar myndugleikar og stovnar, sum Ráðgevingin samstarvar við í nøkrum yvirskipaðum málum.

Ráðgevingin hevur framhaldandi havt samskifti við Heilsu- og innlendismálaráðið í samband við at tryggja sjúklingum í viðgerð í Danmark somu rættindi sum sjúklingar í viðgerð og Føroyum í mun til ymiskar veitingar frá Heilsutrygd. Ein annar trupulleiki sum arbeitt hevur verið við er, at sambært folkegister-loven/fólkyvirlitlógini, skulu persónar sum uppihalda seg longri enn 6 mánaðir í Danmar melda flyting til Danmarkar. Fleiri sjúklingar uppihalda seg longri enn 6 mánaðir í viðgerð í Danmark og eiga sambært lógunum at flyta, men um sjúklingurin flytir missir viðkomandi øll síni rættindi í Føroyum.

Ráðgevingin hevur havt samskifti við Almanna- og heilsumálaráðið í samband við nýggja lóggávu um fyritíðarpensjón í mun til flyting millum Føroyar og Danmark.

Ráðgevingin hevur havt 2 fundir við føroysku fólktingslimirnar og Sendustovu Føroya í Keypmannahavn. Endamálið er regluligt samstarv viðvíkjandi viðurskiftum hjá borgarum sum flyta millum Føroyar og Danmark, herundir markaforðingar. Á skránni hevur verið cpr.nr og NemId, fyritíðarpensjón í samband við flyting millum FO/DK, ALS/DK-a-kassar viðvíkjandi tulking av reglum, har Ráðgevingin hevur gjørt eina støðulýsing og skráseting af sjúklingurm í viðgerð í Danmark í meira enn 6 mánaðir.

Ráðgevingin hevur eisini havt samband við danskar myndugleikar í samband við yvirskipaði mál. Her kann nevnast samskifti við SKAT Udland viðvíkjandi føroyadrádrátti. Í samband við at SKAT hevur útsent nýggja vegleiðing - ‘styresignal’ - í mun reglur fyri føroyafrádrátti hava vit havt ein fund við Skat Udland, har tosað varð um ymisku avbjóðingarnar vit og okkara viðskiftafólk møta í praksis. Tulking av reglum, mannagongdir og ‘tast selv’ skipanina.

Ráðgevingin hevur framhaldandi havt samskifti við ALS og STAR – Styrelsen for arbejdsmarked og rekruttering - viðvíkjandi tulking av reglum um arbeiðsloysisstuðul tá flutt verður millum Føroyar og Danmark til dømis í samband við barnsburðarfarloyvi.

**Mál 17.** Ráðgevingin hevur sum innsatsøki at styrkja amboðini at verkseta og stimbra ”fevnandi” partalag fyri burðardyggari menning. Vit eru uppsøkjandi við núverandi partnarlag og søkja alla tíðina eftir nyggjum partnarløgum sum tørvur er á fyri at vit kunnu tryggja dygd og menning innan ymiskar aktørar. Vit facilitera samstarv við nógv partalag, sum tit síggja undir mál 16. Og síggja at eitt dynamisk og engagera samstarv millum partar gevur eitt dygdargott úrslit. Málrætta innsatsøki innan miðlan og kunning tvørs geirar, netverk hvar vit deila vitan, royndir og blíva hugkveikt til aðra felags vekætlanir.

**Kunning**
Ráðgevingin fremur upplýsandi arbeiði innan tey ymisku økini umvegis heimasíðuna hjá stovninum, facebook og við at luttaka í Pisudøgum í Føroyum og ymiskum tiltøkum í Danmark.

Ráðgevingin hevur eina vælvitjaða heimasíðu við nógvum hentum upplýsingum innan arbeiðsøkið hjá Ráðgevingini. Arbeitt verður við at menna heimasíðuna strategisk. Ráðgevingin fær nógvar

fyrispurningar í samband við skatt. Tað er serliga fyrispurningar um føroyafrádrátt frá lesandi. Ráðgevingin hevur tí arbeitt við at menna kunningina í mun til skatt og føroyafrádrátt. Tað eru lagdar nágreiniligar leiðbeiningar og videoleiðbeiningar – hjálp til sjálvhjálp - á heimasíðuna. Samstundis hevur Facebook verið nýtt til at røkka fleiri viðskiftafólkum við kunning innan ymisku økini.

Ráðgevingin hevur ein faldara um Ráðgevingina generelt og ein 'flyer' til sjúklingar og teirra avvarðandi um sosialráðgeving og vegleiðing frá Ráðgevingini.

Ráðgevingin luttók við framløgu á kunningartiltakinum Pisudagar í august 2019 sum Betri, MFS og útbúgvingarvegleiðarin hjá Studna skipaðu fyri - Kunning til føroysk lesandi, ið fara uttanlands at lesa. Fundir vóru í Runavík og Tórshavn. Ráðgevingin luttók hesu ferð ikki á tiltakinum "Hjálp eg skal uttanlands at lesa", sum Bank Nordik og Ó skipaðu fyri orsaka, at tiltøkuni fullu sama dag.

## Hagtøl

Áheitanir til Ráðgevingina verða skrásettar anomymt fyri at kunna skjalprógva í mun til almennar játtanir og hagtøl til brúk fyri loypandi menning og betran av ráðgevingarvirkseminum.
Síðani 2015 hevur verður nýtt eitt talgilt hagtalsblað frá Almannamálaráðnum, sum verður sent inn hvønn mánað.

Í 2019 fekk Ráðgevingin 1.437 áheitanir. 792 vóru nýggjar áheitanir, 276 afturvendandi um ikki avgreitt mál, og 365 samband fyrr, men um annað.

Niðanfyri er talvur, ið vísa býtið í mun áheitanir, bústaður, viðskiftafólk og slag av spurningum.

| | Áheitan umvegis | | | | Bústaður | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tils. | Tlf. | @ | Pers. | Annað | DK | FO | Annað | Ikki uppl. |
| 1.437 | 674 | 455 | 302 | 5 | 974 | 394 | 42 | 2 |







| Viðskiftafólk | | | Slag av spurningum | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Sjúk. | Lesandi | Onnur | Sosialt | Lestur | Flyting DK | Flyting FO | Skattur | Føroya-frádrátt | Annað |
| 278 | 716 | 441 | 532 | 91 | 61 | 28 | 503 | 231 | 31 |






Áheitanir um telefon er hækkað og fyrispurningar við telduposti eru hækkaðar tilsvarandi. Talið av persónligum samrøðum eru tað sama. Býtið í mun til bústað, viðskiftafólk og slag av spurningum eru stórt sæð tað sama sum í 2018.

Ráðgevingin hevur í 2019 framhaldandi arbeitt við kunning, leiðbeining og videoleiðbeiningum viðvíkjandi skatti og føroyafrádrátti gjøgnum heimasíðuna og facebook mótvegis teimum lesandi – hjálp til sjálvhjálp –. Hetta arbeiðið sást aftur í hagtølunum frá 2016 til 2017, har spurningar frá lesandi og spurningar viðvíkjandi skatti minkaðu. Í 2018 hækkaði talið av fyrispurningum frá lesandi og viðvíkjandi skatti aftur. Orsøkin var, at á sumri 2018 sendi SKAT bræv til føroyingar um at SKAT hevði fingið upplýsing um uttanlands viðurskifti – inniogn og rentuinntøkur í føroyskum peningastovnum og um innistandandi í føroyskum pensjónsskipanum í 2016 og 2017. Í 2019 hevur talið av fyrispurningum viðvíkjandi skatti og føroyafrádrátti verið á leið tað sama sum í 2018. Tað eru framvegis nógvir fyrispurningar í mun til inntøkur úr Føroyum og serliga føroyafrádrátt/ríkisfelagsskapsfrádrátt til hesar inntøkur.

**Bilag 1**

## PERSONDATAPOLITIK – Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark

Rådgivningens tilbud og virke medfører, at vi behandler personlige- og personfølsomme oplysninger.

Vi behandler kun person- og personfølsomme oplysninger til bestemte formål og ud fra berettigede interesser (Interesseafvejningsreglen). Vi behandler kun oplysninger, der er relevante og nødvendige for at rådgive og vejlede, og oplysningerne slettes/makuleres, når de ikke længere er nødvendige.

Rådgivningen tilbyder også anonym mundtlig rådgivning.
Rådgiverne i Rådgivningen har tavhedspligt.

For at kunne rådgive og vejlede dig, kan det være nødvendigt at gennemgå og modtage personlige oplysninger og at opbevare korrespondance, dokumenter, billleder og andet materiale, der indeholder personoplysninger i fysisk og/eller elektronisk form.

Når du får rådgivning og vejledning fra Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark, behandler vi kun oplysninger med dit samtykke og kun de oplysninger, du selv giver os. Vi videregiver ikke personoplysninger til andre uden dit samtykke.

Rådgivningens rådgivere har ifølge lovgivningen underretningspligt og skal underrette kommunen, hvis der er bekymring for dig eller dit barns trivsel.

Når du ringer til Rådgivningen fremgår dit telefonnummer af displayet på telefonen, men vi registrerer det ikke i forbindelse med dit opkald.

Dine oplysninger behandles i anonymiseret form for at kunne føre dokumentation i forhold til offentlige bevillinger og for at kunne føre statestik til brug for løbende udvikling og forbedring af vores rådgivning.

Personoplysninger slettes eller anonymiseres løbende efterhånden som det formål, de blev indsamlet til afsluttes. Dokumenter makuleres/eller tilbageafleveres når sagen er afsluttet eller hvis der ikke har været kontakt/aktivitet i 6 måneder.

**Beskyttelse af personoplysninger**

Dine personlige oplysninger opbevares sikkert og fortroligt. Vi gemmer dine personlige oplysninger i papirform i aflåst skab, som kun rådgiverne har adgang til.

Vi kan ikke garantere 100 % sikkerhed ved dataoverførsler via internettet. Der kan være en risiko for, at andre uberettiget tiltvinger sig adgang til oplysninger, når data sendes og opbevares elektronisk. Du afgiver dine personlige oplysninger på eget ansvar, og Rådgivningen er ikke erstatningspligtig for eventuelle krav, der måtte opstå i den anledning.

**Dine rettigheder**
I overensstemmelse med databeskyttelseslovens bestemmelser herom, har du ret til:

1. At blive oplyst om behandlingen af data
2. At få indsigt dine personoplysninger
3. At få berigtiget urigtige personoplysninger
4. At få slettet dine personoplysninger
5. At begrænse behandling af personoplysninger
6. At flytte personoplysninger (dataportabilitet
7. At gøre indsigelse
8. At klage til Datatilsynet www.datatilsynet.dk/borger/klage-til-datatilsynet/

**Mail – Hjemmeside – Facebook**
Rådgvingen har implementeret sikker mail fra Logiva via Rådgivningens hjemmeside. En løsning der gør det muligt at sende og modtage sikker mail til og fra DK/FO og til og fra instiutioner og enkeltpersoner.
Vedrørende hjemmesiden www.radgevingin.dk , registreres kun oplysninger i anonymiseret form i hjemmesidens statestik.
Vedrørende facebook vil administrator fjerne evt. personfølsomme oplysninger i kommentarfeltet.
Vedrørende beskeder i indbakke bør Rådgivningen på siden henstille til at der ikke sendes dokumenter med personfølsomme oplysninger.

**Oplysninger om ansatte**
Personoplysninger om ansattes forhold behandles i oversstemmelse med gældende lovgivning, herunder bogføringsloven og skattereglerne samt institutionens drift.
Personoplysninger i fysisk form opbevares i et aflåst skab, hvor kun relevante medarbejdere har adgang.
Ved fratrædelse gemmes relevante personoplysninger. Bogføringsbilag, herunder lønbilag gemmes i 5 år fra udløbet af det regnskabsår, som bilaget drejer sig om. Andre relevante oplysninger til opfølgning og stillingtagen til eventuelle krav gemmes i 1 år.

**Diverse**
Færøerne er godkendt som sikkert 3. land.
Databeskyttelsesrådgiver ikke et krav i forhold til Rådgivningens virke.
Der er underskrevet databehandlings aftaler med vores udbyder Azero og Logiva - Sikker mail.